# smótið






DONG er sera virkið á Atlantsmótinum




Dong hevur 68 leitiloyvi í Føroyum, Bretlandi, Noregi og Danmark

hevur hetta við sær lutfalsliga høgar kostnaðir, og undirstøðukervið skal byggjast upp frá grundini. Harafturímóti er lutfalsliga lítið leitað í økinum og sær økið sera lovandi út. Leitingin í føroyskum øki hevur eisini aðrar stórar avbjóðingar, serliga orsakað av basaltinum sum fjalir størsta partin av føroyska økinum.

- Jarðalisfrøðingar og jarðfrøðingar okkara eru tó sera dugnaligir at tulka data frá slíkum økjum. Ætlaninar hjá okkum við hesum økinum liggja longri úti í framtíðini, men í langskygdu strategiini hjá okkum hava hesi økini við stórum váða ein týdningarmiklan leiklut. Hetta tí at væntandi kann stórur vinningur fáast um olja ella gass verður funnið her, staðfestir leitistjórin Jan Terje Edvardsen.

DONG fingið fleiri nýggj loyvi í Noregi og Bretlandi

Sterka støðan hjá DONG í hesum økjum er styrkt við, at DONG hevur fingið tillutað 3 nýggj loyvi á mið-norskum øki og 2 nýggj loyvi í økinum vestan fyri Hetland, í seinastu norsku og bretsku útboðsumførunum, sum vórðu almannakunngjørd fyri stuttum.